# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Somu rættindi fyri øll

Nógvir føroyingar fáa ikki fylgt við í politiskum orðaskifti, og tí eru teir útihýstir frá fólkaræðinum, og tað er ein trupulleiki fyri samfelagið. Soleiðis ljóðar frá stovnum og felagskapum nú altjóða handicapdagur er. Ein slík støða eigur ikki at vera góðtikin í einum vælvirkandi fólkaræði, tí øll eiga at hava møguleikan at seta seg inn í politisk viðurskifti og gera sær sína egnu meining. Hesir eru spurningar, sum felagsskapir og myndugleikar av røttum varpa ljós á ein slíkan dag. Tað er sera áhugavert at fokus verður sett á løgtingsvalið við atliti at støðuni hjá brekaðum, og tað er upplagt júst at nýta altjóða handicapdagin til hetta endamál.

Tað er ein skylda hjá teimum, sum taka lut í politiska orðaskiftinum og hjá teimum, sum skipa fyri upplýsing og orðaskiftum, at seta sær spurningin, hvussu tryggja vit øllum uttan mun til handicap møguleikar at taka aktivan lut í fólkaræðiligum tilgongdum? Hetta er eitt mál um politikk og um vælferð. Í mong ár hevur alt annað enn vælferðin verið á skránni. Okkara politisku leiðslur, uttan mun til ideologiskt støði, hava verið upptiknar av ávikavist fullveldi og búskaparligum vøkstri. Alt gott um tað – hetta eru jú sera týðandi politisk mál fyri land sum okkara.

Hinvegin er tíðin nú komin at seta fokus á vælferð fyri øll og jøvn rættindi. Vit hava sera góðar tíðir, og Føroyar sigast vera eitt av heimsins bestu londum at liva í. Hetta er, sum tað klárt gongur fram av altjóða handicapdegnum, ein sannleiki við avmarkingum. Nú mugu flokkarnir taka annað skinn um bak. Vit halda okkum hóma nakrar glottar, eitt nú við tí lógartyssi hjá landsstýrismanninum í almannamálum, sum nevnist bústaðarpakkin. Her verður latið upp fyri nógv betri bústaðarmøguleikum hjá fólki við breki og serstøkum tørvi. Men enn trýtur nógv, og langt er á mál. Hetta skal alt síggjast í ljósinum av vælferðarsamfelagnum. Hetta mál hevur leingi ligið á láni, samstundis sum spurningurin um vælferðina er vorðin heitasti politiski spurningur í øllum okkara grannalongum. Somu rættindi fyri øll er eitt sjálvsagt krav í einum fólkaræði.

**Sosialurin**

## Hvat merkir gott ferðasamband?

Val



MAUD WANG HANSEN
Tjóðveldi

Tað merkir trivnaður og framgongd í einum nútímans samfelagi.

Isolasjón ella einsemi er tengt at vánaligum ferðasambandi.

Vit vita í dag, at familjur í Føroyum búgva ymsa staðni kring landið. Hugurin at ferðast og vera saman við sínum kæru er nógv størri, enn møguleikin fyri at útynna hetta í verki. Aloftast eru tað vánaligu ferðaleiðirnar ella – sambondini, sum halda einum aftur.

Eitt nú eru føroyingar tilvitaðir um virðini í at útbúga seg, tað eru bæði kvinnur og menn, men ofta førir tað við sær, at ein má ferðast millum bygd og bý fyri at røkja dreymastarvið ella starvið, tú fekk, sum hóskaði til tín førleika. Tað er nú einaferð so, í einum mordernaðum, sentraliseraðum landi sum Føroyum, at flestu størvini eru í stórbýunum, her serliga í Havn. Tað merkir, at nógv fólk mugu koyra ella sigla langa leið til arbeiðis ella í skúla. Flestu útbúgvingarmøguleikarnir eru eisini savnaðir í Havn, sum náttúrligt er, tí Havnin er jú okkara høvuðsstaður. Politikarar hava ábyrgd av, at fólk kunnu búgva, har tey vilja, og ikki har tað er høgligast at sleppa til arbeiðis. Tað er trivnaðurin í øllum samfelagnum, sum hevur týdning, ikki bert í miðsavningini.

Tá ið eg valdi at stilla upp fyri Tjóðveldi, var tað fyri at gera politikk nærverandi og gerandiskendan og fyri at verja tey menninskjansligu virðini í føroyska samfelagnum fyri øll.

At virka fyri teim sokallaðu bleytu virðunum inniber eisini at taka støðu til trivnaðin hjá hvørjari einstakari familju. Eg vil tí varpa ljós á, at eitt trygt og gott ferðasamband er alneyðugt fyri okkara samfelag. Tað er óviriðiligt, at fólk skulu setast aftur ella skerjast fyri óteljandi mentannarligu og sosialu møguleikarnar, sum samfelagið bjóðar nú, tí tey aftra seg við at koyra gjøgnum gamlar, órøktar tunnlar og eftur vegastrekkjum, har bert staðkend tora at koyra um veturin, ella har ferjur og ferjulegur ikki lúka krøvini ella ynskini frá teimum, sum skulu brúka tær. Tað er ikki politikarin í Havn, sum kennir tín tørv ella tíni ynski um ferðasamband, tað er tú, og eg vil hervið bjóða tær við í eitt samstarv, um hvussu tín gerandisdagur kann gerast betri, har tú býrt, og har tú ynskir at virka.

## Takk til alla politisku skipanina

Val



PÁLL Á REYNATÚGVU
løgtingsmaður og borgarstjóri
Tjóðveldi

Principiella samtyktin av Sandoyartunnlinum til aðru viðgerð í Løgtinginum í dag, er eitt risafet hjá Sandoynni at fóta sær, sum samanrunnin partur í samanbundnu Føroyum. Tí hóast tað verður ein stór semjuroynd at finna fíggingina innan fíggjarlógarkarmin komandi árini, so er avgerðin í dag staðfestingn av at øll politiska skipanin stendur aftanfyri komandi Sandoyartunnilin. Her vendist ikki aftur, og nú er kósin sett hjá Sandoynni, og øllum okkum, sum her búgva. Samlaða politiska skipanin skal hava stóra tøkk og mikið rós fyri djørvu avgerðina í dag.

Nú er eftir hjá okkum, sum her búgva at brynja okkum til at tunnilin er veruleiki. Vit hava 5-6 ár at fyrireika okkum í, og vit eiga øll at leggja árar í sjógv, til tess at menna oynna saman.

Framtíðin í oynni sum varð hótt, sær nú bjørt út, og samhaldsføstu føroyar sigraðu.

Hjartans tøkk!

Framtíðin í oynni sum varð hótt, sær nú bjørt út, og samhaldsføstu føroyar sigraðu.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.